## Stjórin hevur stórt virði

Vinnuhúsið skrivar á netinum, at kanningar í Danmark hava víst, at ovasti stjórin í fyritøkum aloftast hevur eitt sera stórt virði fyri fyritøkuna. Miðal danska fyritøkan missir tað, sum svarar til alt yvirskotið tey seinastu trý-fýra árini, tá stjórin óvæntað doyr, ella um hansara/hennara hjúnafelagi ella barn doyr. Tað hevur meira ella minni ongan týdning fyri yvirskotið, um verforeldur ella onnur í familjuni hjá ovasta stjóranum doyr. Hetta vísir ein víttfevnandi kanning av familjuviðurskiftunum millum allar danskar fyritøkur, har ovastu stjórarnir í knappliga 7.000 av teimum vóru úti fyri deyðsfalli.

## Sethúsarentan hækkar 0,1%

Á heimasíðu sínari sigur Føroya Banki, at hetta er úrslit av rembingum á altjóða fíggjarmarknaðinum. Í 2007 lænti Føroya Banki 1,9 mia kr. á altjóða fíggjarmarknaðunum fyri at fíggja efturspurningin eftir lánum í Føroyum. Føroya Banki hevur høgt kredittvirði og kann læna fyri lutfalsliga bíligar rentur. Men av tí, at marknaðarrenturnar eru hækkaðar nógv, hava lánini havt við sær munandi hækkaðar rentuútreiðslur fyri bankan. - Alt bendir á, at fíggjarútreiðslurnar hjá bankunum eru komnar upp á eitt varandi hægri støði. Bankin livir av muninum í millum rentuna, ið bankin rindar fyri at læna, og rentuna, ið kundin rindar, og tá rentan, ið bankin rindar, hækkar, má rentan hjá kundunum eisini hækka. Tí hækkar bankin rentuna nú, sigur Janus Petersen, forstjóri í Føroya Banka. Rentuhækkingin hjá Føroya Banka er millum 0,1 og 0,5 prosentstig, og rakar hetta bæði privatkundar og vinnukundar. Sethúsarentan hækkar minst. Nevnliga 0,1 prosentstig fyri 1. veðrættarlán.



*- Hesi árini hava verið spennandi, men tey hava eisini verið sera krevjandi. Onkur løta kundi verið óynskt, men nógv fleiri hava verið stuttligar, sigur Gunnar Mohr, fyrrverandi skipasmiðjustjóri*

*Mynd: Vilmund Jacobse*

Skála Skipasmiðju. Hetta var ein spennandi hending og avbjóðing at fáa gongd á aftur har inni.

- Tað vóru eisini týðandi hendingar, tá ið maskinverkstaðurin FJM í Runavík kom upp í virksemið, og tá tað í 2006 eydnaðist at endurskapa skipasmíð í Føroyum og fáa tveir sáttmálar við Thor um bygging av supply-skipum á Skála.

Gunnar helt, at tað hevur hepnast væl í hesi vinni nú í umleið sjeyti ár.

- Virksemið byrjaði í teimum truplu 1930-árunum og kom ígjøgnum tey truplu 1950-árini eins og gjøgnum herviligu kreppuna í 1990-árunum. Felagið hevur havt avlop hvørt einasta ár, legði hann aftrat.

### Nýggjar tíðir

Í 2004, tá ið eigaraviðurskiftini vóru komin í triðja ættarliðog fleiri í fjórða ættarliði vóru vorðin vaksin, avgjørdu eftirkomararnir eftir Kjartan Mohr at selja skipasmiðjuvirksemið úr felagnum til íløgufelagið Notio.

- Hetta var sjálvandi ein kensluborin avgerð, men fyri okkum og hetta virksemi var hetta avgjørt ein røtt avgerð.

At enda takkaði Gunnar Mohr øllum teimum trúgvu starvsfeløgunum og samstarvsfeløgunum fyri gott samstarv. Hann nýtti eisini høvi at ynskja nýggja stjóranum, Eyðfinni Egholm, blíðan byr.

# Oddmar skal gera vindeygu og hurðar

**Tað er ikki á hvørjum degi, at tvær móttøkur eru í Skopun sama dag, men soleiðis var í gjár, tá ið móttøka var á fiskavirkinum – og á nýggja snikkaravirkinum hjá Oddmari Hentze**

TRÆSMÍÐ
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Oddmar Hentze fekk blómur og hevði fleiri vitjandi inni á gólvinum í gjár*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Sannur hátíðardámur var yvir Skopunarbygd í gjár.

Meðan vit vitjaðu á fiskavirkinum, tí móttøka var í sambandi við 40 ára stovningardag, frættu vit, at skopuningurin, Oddmar Hentze, eisini hevði móttøku. Hann er nú til reiðar at fara undir framleiðslu av vindeygum og hurðum á Snikkaravirkinum á Skerinum, tey rópa.

Oddmar hevur leigað seg inn í bygningin hjá Sands Timburhandli í Skopun, sum eisini er settur í stand til endamálið.

- Yvirtromin er skift, og ymiskt er gjørt innan, so bygningurin lýkur krøv sum karmur um arbeiðspláss.

Longu áðrenn virkið hjá Oddmari er farið undir framleiðslu í Skopun, hevur hann fingið bíleggingar fyri einar 250.000 krónur.

- Eg noyðist at seta ein mann í starv beinanvegin, og helst kemur ein lærlingur seinni. Sum er, havi eg ikki toráð at lýst við mínum komandi virksemi.

Oddmar er útbúgvin snikkari hjá BSV, Bygningssnikkaravirkinum í Havn, og nú fer hann burturav at arbeiða við tí, hann hevur lært til.

- Arbeiðshølið er 120 fermetrar, og eg havi tær maskinur, sum eg skal brúka.

Málið hjá snikkaranum er at framleiða dygdar vindeygu og hurðar til føroyska marknaðin, og okkum varð sagt í Skopun, at Oddmar er dugnaligur og snøggur handverkari.

Óhugsandi er ikki, at Snikkaravirkið á Skerinum fer at framleiða hurðar fyri eitt stóran útbjóðara á marknaðinum í Føroyum.

- Eg havi verið í sambandi við H-Dygd, sum hava spurt seg fyri, um eg møguliga kann framleiða hurðar fyri teir. H-Dygd er ein lutfalsliga stór fyritøka, og koma vit ásamt um at framleiða fyri teir, kann hetta gerast ein munandi partur av okkara virksemi.

Oddmar Hentze sigur, at enn er virksemið hjá honum so nýtt, og tí er torført at siga í løtuni, hvat fer at spyrjast burtur úr.

Hann hevur góðar vónir um, at hetta verður ein lønandi vinna.

- Jú, eg haldi, at hetta sær lovandi út, sigur snikkarin í Skopun, sum fekk blómur og hevði fleiri vitjandi inni á gólvinum á virkinum í gjár.

Í sambandi við móttøkuna bjóðaði hann køkur, kaffi og te.



*Oddmar saman við mammu síni og konuni, sum er ættað úr Hjøllum á Toftum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*